DAGSINS MEINING

Búskapurin heitur

Føroyski búskapurin er rættiliga heitur í løtuni. Vit hoyra at bilasølan er hægri enn nakrantíð. Kommunal arbeiði verða bjóðaði út, uttan at nakað tilboð kemur inn. Húsaprísirnir í høvuðstaðarøkinum eru himmalhøgir, og soleiðis kundu vit hildið fram. Afturat hesum eru ávaringar frammi frá fiskifrøðingum um minking í æti og ovurfisking. Dagblaðið ger gjøldur burturúr fiskifrøðingunum og man tosar um besta figgjarmálaráðharra nakrantíð.

Ljóðar hetta kent? Omanfyristandandi brot kundi verið skrivað í 1988, men tað er tað ikki. Soleiðis sær út í dag, og minnir støðan sera nógv um støðuna áðrenn búskaparkreppuna fyrst í 90'unum.

Onkur munur er tó. Rentuspekulatiónin er tipt fyri langari tíð síðani og veðhaldsskyldurnar hjá landinum eru nakað lægri, enn fyri 15 árum síðani. Uttanlandsskuldin er ikki høg, og partar av vinnulívinum tykjast verða vælkonsolideraðir. Fyrr var illa, aftaná stórsaneringarnar fyri 10 árum síðani.

Hóast tað eru element í búskapinum, ið eru munandi betri fyri í dag, enn fyri 15 árum síðani, so krevst at verða á varðhaldi, ístaðin fyri at ganga og skammrósa landstýrisfólki, ið koma at fáa søgunar dóm um 10 ár. Um søgunar dómur yvir búskapar- og figgjarpolitikkin hjá sitandi samgongu verður positivur ella negativur, kemur tíðin at vísa. Tað er undir øllum umstøðum umráðandi, at landið og bankar skalka lúkurnar, tí sjaskveður kann verða fyri framman. Søgan vísir okkum, at fyriuttan tilfeingi, so koma búskaparligir aldudalar í heimsbúskapinum eisini at raka Føroyar – vit kunnu bert hyggja at úrslitunum í partabrævahandli seinastu tvey árini.

Fiskivinnan og alivinnan hava havt tað gott nú í mong ár, men trøini veksa sum kunnugt ikki inn í himmalin og er tað umráðandi, at landstýri og løgting taka ávaringarnar frá fiskifrøðingum fyri fult. Umráðandi er eisini, at hugt verður at okkara skattaskipan og frádráttarskipan, soleiðis at einki er í henni, ið ger ovurupphitingina verri.

Ein av grundunum til, at aftur ber til at tosa um búskaparpolitik, figgjarpolitikk, konjukturar og vinstra/høgra er, at fullveldismálið er lagt á ís, og vit aftur hava heimastýrispolitikk við onkrari hissini yvirtøku her og eina aðrari der. Vinstrivongurin í Løgitinginum – Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin – kunnu semjast um nógv, sum vit hava sæð tað í t.d. privatiseringskjakinum. Ein sosialt bevístur skynsamur figgjarpolitikkur má fórast, og kanska kann hetta gerast tvørturum samgongumark við Tjóðveldinum og Javnaðarflokkinum á odda. Løgmaður tosar altíð um samstarv tvørturum samgongumark. Spurningurin er bara, hvussu konstruktivt hann hevði sæð uppá tað, um ein búskapar-, figgjar- og vinnupolitikkur, ið onkuntíð fór uttanum Fólkaflokkin, hevði gjørst veruleiki.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Mannaheimurin og føroyingar

Hans Birgir Hansen

Tað er tá vit fylgja við bløðum, útvarpum, sjónvarpum, tá lesa, hoyra, sígggja vit hvussu allur mannaheimurin í dag líður undir kríggi og nógvu ræðuleikunum.

Tað er á sama hátt ígjøgnum bløð, útvarp og sjónvarp, at vit staðfesta, at mannaheimurin er allur skipaður rættuliga einstáttaður av einarøðis valdsharrum.

Tað er við hjálp av stórkapitalistum ið vilja gera allan mannaheimin til arbeiðandi trælir sum dagliga líðir undir øllum teimum fyribrigdum sum ein stríðist við.

Tað er álvarsliga áfatt, tá ið føroyingar ikki fáa klára upp við seg sjálvi og gevast við at lata seg misnýta av teimum sterku í samfelagsskipanum um landi.

Tað er at vera skitna arbeiðsamboði ímóti teimum, ið stríðast fyri frælsi-, mannajavnbjóðisrættindir, privatlív, ið øllum er grundlógartryggja í dag.

Tað er samfelags skylda ein røkir, tá ið ein fær nógva kunning í bløðini Ið vanligir føroyingar ikki fáa frá øllum teimum valdstystandi við kræddaralyndi.

Tað er alt grundleggjandi skeivt og órættvíst skipa, tá Ið ikki allir føroyingar fáa somu fortreytir/grundarlag at liva, og virka eftir førleikaevnunum.

Tað er bæði sum einstaklingar og sjálvstøðugt vinnurekandi stór og smápartafeløg inna alt handils- og vinnulív og ídna- og tænastuvinnur um landið.

Tað er avgerðandi neyðugt at draga sum skjótast niður alla almenna, privata, kommunala, land, ríkis skuld, og fáa hesi at skipa figgjar- og presónsfrælsi.

Tað er avgerandi at koma øllum fordingum/mótarbeiðan einaræðis valdsharrum og stórkapitalistum til lívs sum vanliga fólkið líður undir.

Tað er ikki minst galdandi øllum teimum, sum fremja samfelagsundirgravandi virksemi øll tann bíliga arbeiðsmegin um landið - næmingar, lesandi og lærlingar.

Endurútgáva frá 1982:

Black Bird út á fløgu

Bandið, sum Black Birds gav út í 1982, kemur týsdagin út á fløgu

FLØGUÚTGÁVA

Tað var í juni í 1982, at tónleikabólkurin Black Birds við Marner Andreasen, Árna Andreasen og Oskari Eirikson, góvu út eitt kasettuband við sjómanssangum og onkrum lættari tónleiki afturat. Kasettubandið varð sera væl mótgtikið. Tað vórðu seld meiri enn 3.000 bond eftir trimum mánaðum.

– Nú eru 20 ár liðin síðani bandið kom út. tað munnu ikki vera nógv, sum eiga hetta kasettuband í dag. Eftir fleiri áheitanir, hava vit tí gjørt av at geva bandið útaftur – hesaferð á fløgu, siga teir tríggir í Black Birds.

Fløgan kemur út týsdagin komandi, og verður fyrsta upplagið 250 fløgur. Á fløguni eru níggu løg og yrkingar, sum Harry Birtulíð, Viggo Johansen, Birni Dam, Simmi Jacobsen og Victor Danielsen hava gjørt. Harry Birtulíð eigur yrkingarnar, »Eg havi prøva«, »Sum ungur eg fór«, »Aftan stongdar dyr« og »Djúpt í havsins djúpa favni«. Viggo Johansen eigur yrkingina »Stella Argus«, sum er um Stellduna, sum gekk burtur í 1959. Simmi yrkti »tvær fjaðrar«. Victor Danielsen yrkti »Jónas«. Herman Jacobsen yrkti »Havnar býur«, og Birni Dam yrkti yrkinginga »Alt í lagi«.

Kasettubandið bleiv innspælt í MZ Ljóðteknikk, hjá Milson Zachariasen. RMS Studio hevur staðið fyri fløguframleiðsluni.

T kk

jartaliga takka it k l f lki i og øll
jál e i og a ke l tá ið k ra
a a er a a o a og la go a okkara

e et e t e
t

o ði og arð jarðað.
Takk til t kk øll r a b ði
ei a og á a j kra i .
i erlig tøkk til ki l e itjaði a a
eða o ar i løg .
Takk f ri tro tarr k orð b ði be e er ete a
og á grø i i.
Takk f ri bl r kra ar og gá r til bar aleg r ar
rø la i og tøkk til t kk øll f lg
e i til e ara ei a ta l ar tað.
ig i t kk øll.

Familjunnar vegna
u o e

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

Verkfall í oljuvinnuni

Meiri enn 1200 fólk, sum fáast við at veita norsku oljuvinnuni serligar tænastur, fóru í gjár í verkfall. Talan er eitt nú um kavarar og jarðfrøðingar.

Samráðingarnar um ein nýggjan sáttmála slitnaðu gjáranáttina, og stutt eftir boðaði fakfelagið frá, at 1200 av limum tess fóru í verkfall. Tey 1200 arbeiða hjá 17 ymsum arbeiðsgevarum.

Ein talsmaður hjá oljuvinnuni segði í gjár, at verkfallið fer at hava við sær, at framleiðslan á summum oljuleiðum fer at steðga sum frá líður.

Týskarar byggja

Týska byrrifelagið Bilfinger Berger hevur fingið arbeiðið at byggja eina nýggja brúgv um Svinesund á markinum millum Noreg og Svøríki.

Brúgvin verður 600 metrar long og skal hava fýra koyribreytir, og hon kemur afturat gomlu brúnni, sum varð bygd í 1946. Brúgvin skal eftir ætlanini takast í nýtslu um trý ár.

Tann nýggja brúgvin fer at kosta 527 milliónir svenskar krónur, og norðmen og sviar hava avtalað, at hon skal figgjast við bummpengum. Tað fer at kosta 20 krónur at koyra yvir um brúnna.

Halda prísinum uppi

Avgerðin hjá OPEC-londunum at varðveita núverandi avmarkaðu framleiðsluna heldur oljuprísinum uppi og virkar sostatt eftir ætlan. Seinastu dagarnar hevur tunnan ligið um 25 dollarar á evropeisku marknaðunum., og tað samsvarar við ætlanina hjá OPEC, sum hevur sagt, at felagsskapurin ætlar at halda prísinum millum 22 og 28 dollarar fyri tunnuna.

Serfrøðingar á oljumarknaðinum siga kortini, at oljuprísurin kann koma undir trýst, tí eftirspurningurin í USA hevur verið viknandi. Heldur tann gongdin fram, kann tað skjótt trýsta oljuprísin niður.

Ikki yvirgangur

Tað var ikki ein yvirgangsatsókn, tá ein maður hóskvøldið skjeyt og drap tvey fólk uttan fyri deildina hjá ísraelska flogfrelagnum El Al í floghavnini í Los Angeles. Tað siga amerikansku myndugleikarnir, men ísraelsmenn vilja kortini vera við, at talan var um eina yvirgangsatsókn.

Ísraelskir ráðharrar søgdu í gjár, at álopið í amerikansku floghavnini var ein liður í herferðini hjá víðgongdum muslimum ímóti Ísrael og ísraelskum málum.

Maðurin, sum drap tey bæði fólkini og særdi sjey onnur, var ættaður úr Egyptalandi, men hevði búð í USA seinastu tíggju árini.

Bretsk ferðamannaflogfør nær samanstoyti

Tvey flogfør hjá British Airways vóru bert 300 metrar frá hvør øðrum í luftini uppi yvir Wales mikukvøldið

FLOGFERÐSLA
Árni Joensen

Annað flogfarið var á veg úr Glasgow í Skotlandi til Bristol í Suðuronglandi við 43 ferðafólkum. Í hinum flogfarinum, sum var á veg norður til Newcastle, vóru 22 ferðafólk.

Um sjeytíðina mikukvøldið vóru tey bæði flogførini komin so nær hvør øðrum, at ávaringarskipanin umborð á báðum boðaði frá, at annað flogfar var á somu leið. Ávaringarskipanin umborð á øðrum flogfarinum gav flogskiparanum boð um at fara longur upp, meðan skipanin umborð á hinum flogfarinum bað flogskiparan fara longur niður.

-Ávaringarskipanin gjørdi júst tað, sum hon er ætlað at gera í tílíkum førum, segði ein talsmaður hjá British Airways hóskvøldið.

Bretsku loftferðslumyndugleikarnir hava kortini gjørt av at kanna, hvussu tað kundi bera til, at tey bæði flogførini komu so nær hvør øðrum.

Mánakvøldið doyðu 71 fólk, tá eitt russiskt ferðamannaflogfar og eitt flutningsflogfar stoyttu saman yvir Suðurtýsklandi.

USA fyrireikar stórálop á Irak

Ætlanin er at nýta bæði flogfør og hermenn í álopinum.

Amerikanska blaðið The New York Times skrivar, at amerikanska herleiðslan fyrireikar eitt stórálop á Irak.

Sambært upplýsingum, sum blaðið hevur fingið fatur á, ætlar herleiðslan at lata hermenn í tíggjutúsundatali gera innrás úr grannalandinum Kuwait, samstundis sum flogfør skulu søkja at týðandi málum.

Endamálið við álopinum er at fella iraksku forsetan, Saddam Hussein.

Amerikanski forsetin, George W. Bush, hevur fleiri ferðir sagt alment, at eitt av málum hansara er at fáa Saddam Hussein av vegnum, men higartil hevur hann ikki viljað sagt, hvussu hann ætlar sær at fullføra málið.

Úr Norðurlondum:

Niðurgera kvinnur

Kvinnufelagsskapir í Noregi ilskast um, at giftar kvinnur kunnu ikki spyrja skattavaldið ella fólkayvirlitið um síni egnu viðurskifti, uttan at tær upplýsa persónstalið hjá manninum.

Norsku javnstøðumyndugleikarnir geva kvinnufelagsskapunum rætt. Mona Larsen-Asp, varastjóri í javnstøðuráðnum, sigur, at kvinnur verða mettar sum sjálvsstøðugir persónar í dag, og tí heldur hon, at giftar kvinnur eiga at fáa upplýsingar um síni viðurskifti uttan at nýtast at upplýsa persónstalið hjá manninum.

Norsku skattamyndugleikarnir siga, at persónstalið hjá manninum er høvuðstalið hjá hjúnum, men at hesi viðurskifti møguliga verða broytt, tá edvskipanin verður broytt um nøkur ár.

Full fongsul

Donsku fongslini hava so nógvar fangar sitandi, at nógv, sum verða dømd inn at sita, noyðast ella kanska rættari sagt sleppa at bíða í langa tíð eftir einum kliva at sita í.

Sum er verða bara fólk, ið fáa dóm fyri grovan harðskap, sett inn beinanvegin, men umleið 300 fólk, sum eru dømd fyri rúsdrekkakoyring, innbrot o. a. noyðast at bíða eftir plássi.

Lene Espersen, løgmálaráðharri sigur, at stjórnin fer at játta fongsulsverkinum meiri pengar næsta ár, men hon hevur einki uppskot um, hvussu trupulleikarnir nú kunnu loysast.

Arbeiðsloysi og arbeiði

Arbeiðsloysið í Oslo er nú so stórt, sum tað ikki hevur verið í langa tíð, men tað løgna er, at arbeiðsgevarar samstundis kæra seg um, at teir fáa ikki nóg mikið av arbeiðsfólki. Sambært hagtølunum eru 15.314 fólk arbeiðsleys í Oslo, samstundis sum umleið 3.900 størv eru ósett í býnum, tí arbeiðsgevararnir fáa ikki fólk.